




## *Reiðskap til fátækar fiskimenn*

**Vit hava spurt Jack Thomsen, sum er við í verkætlanini í Eritrea "Hjálp frá fiskimanni til fiskimann", hvørjum reiðskapi hann sóknast eftir í Føroyum til fátøku fiskimenninar í Eritrea?**
- Vit sóknast eftir brúktum hondsnellum, brúktari línu og hava eisini áhuga at hoyra frá fólki, sum vilja lata teinar og lodd fyri ein bíligan penga.

**Nær verður reiðskapurin sendur avstað?**
- Ætlanin er, at ein bingja við reiðskapi skal sendast avstað í februar, og síðan fara Knud Andersen, sum umboðar felagsskapin "Levende hav", og eg niður aftur til Eritrea í mars at læra fiskimenn at brúka reiðskapin.

**Hvagar kunnu fólk, sum kanska hava okkurt at lata, venda sær?**
- Tey kunnu ringja til mín á tlf. 224644 ella á 327113. Reiðskapur er kærkomin, og vit vilja læra fiskimenninar at brúka útgerðina. Tað nyttar einki bara at senda skip, bátar og reiðskap avstað. Onkur má vera, sum leggur teimum lag á.

**Sóu tit nakað, tá tú og Knud vóru í Eritrea í heyst, sum sigur tær, at fólk mugu fylgja við hjálpini?**
- Ja, har liggja skip, sum ikki loysa, tí tað nyttar einki bara at senda skip, bátar ella útgerð avstað - og so halda, at ting henda av sær sjálvum. Neyðugt er at verða við og hjálpa fólkinum í gongd, sigur Jack Thomsen.

# Fellan




Roynt verður framvegis at fáa Tórshavnar býráð at seta pengar í fiskavirking

## Í MORGIN

*5/8 °C*




Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi og norði og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

## MIKUDAGIN

*7/10 °C*




Fyrrapartin lot til andøvsgul av norði, seinnapartin fríska hann vindin av útsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 7 og 10 stig.

## HÓSDAGIN

*8/11 °C*




Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hititn millum 8 og 11 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin frískur vindur av útnyrðingi, leygardagin lækkar hann niður í útsynning. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 999 hPa. við Lofoten fer suðureftir. Kuldabrúgvin við Føroyar fer í landsynning. Ein hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum týsnáttina.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið við Jan Mayen fer eystureftir og brúgvalagið við Føroyar fer í landsynning.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 133 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -5 | **Tromsø** | -- | **Moskva** | 0 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 2 | **Bergen** | 0 | **Berlin** | 5 | **Beijing** | 0 |
| **Tórshavn** | 4 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 13 | **New Dehli** | 19 |
| **Lerwick** | 3 | **Stokkhólm** | -4 | **Madrid** | 8 | **Bangkok** | 31 |
| **Aberdeen** | 4 | **Keypmannah.** | 0 | **Róm** | 13 | **Sydney** | -- |
| **London** | 13 | **Helsinki** | -6 | **Malorca** | 16 | **New York** | 0 |

## VESTFALLSKYRRINDI

19. jan. Fullmáni
22. jan. Mánin næstur jørðini
26. jan. Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2011

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Dagur** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** | **fp.** | **sp.** |
| 24. jan. | 10:00 | 22:25 | 09:00 | 21:25 | 09:15 | 21:40 | - | 12:00 | 00:35 | 13:00 | 08:15 | 20:40 | 07:15 | 19:40 | 10:15 | 22:40 | 11:15 | 23:40 | 09:45 | 22:10 | 11:00 | 23:25 |
| 25. jan. | 10:51 | 23:17 | 09:51 | 22:17 | 10:06 | 22:32 | 00:25 | 12:51 | 01:25 | 13:51 | 09:06 | 21:32 | 08:06 | 20:32 | 11:06 | 23:32 | - | 12:06 | 10:36 | 23:02 | 11:51 | - |
| 26. jan. | 11:44 | - | 10:44 | 23:24 | 10:59 | 23:39 | 01:17 | 13:44 | 02:17 | 14:44 | 09:59 | 22:39 | 08:59 | 21:39 | 11:59 | - | 00:32 | 12:59 | 11:29 | - | 00:17 | 12:44 |
| 27. jan. | 00:24 | 13:04 | - | 12:04 | - | 12:19 | 02:24 | 15:04 | 03:24 | 16:04 | 11:19 | 23:59 | 10:19 | 22:59 | 00:39 | 13:19 | 01:39 | 14:19 | 00:09 | 12:49 | 01:24 | 14:04 |
| 28. jan. | 01:44 | 14:25 | 00:44 | 13:25 | 00:59 | 13:40 | 03:44 | 16:25 | 04:44 | 17:25 | - | 12:40 | 11:40 | - | 01:59 | 14:40 | 02:59 | 15:40 | 01:29 | 14:10 | 02:44 | 15:25 |